# Ónøgd við byggiloyvi í Hoyvíkshaganum

**Tey, ið hava keypt sær eittplans raðhús í Torkilsgøtu í Hoyvíkshaganum, eru í hesum døgum sera ónøgd við byggiætlaninar hjá býráðnum. Tey fara nevniliga í næstum at fáa nýggjar grannar, at kalla beint uttanfyri vindeygað. Beint niðanfyri eittplans raðhúsini, í Maritugøtu, eru nú reistir múrar til eitt nýtt raðhús, ið skal hava tvær fullar hæddir**

HÚSABYGGING
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*Enn eru bert múrarnir reistir, men tað er bert ein spurningur um tíð, áðrenn húsaeigararnir í Torkilsgøtu fáa nýggjar grannar, sum síggja inn í stovur teirra*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í Hoyvíkshaganum vórðu fyrst raðhúsini í Jørundargøtu reist. Síðani vórðu raðhúsini í Torkilsgøtu bygd, tó ikki sum upprunaliga ætlað. Fyri ikki at taka nakað av útsýninum frá húsunum í Jørundargøtu, sum tó standa væl hægri, varð ikki givið loyvi at byggja húsini við eini reising á 45 stig, sum ætlað. Reisingin skuldi lækkast til 28 stig.

Nú er triðja byggistig farið í gongd í Hoyvíkshaganum. Talan er um eini nýggj raðhús, í Maritugøtu. Hesi húsini verða í tveimum fullum hæddum, og koma at standa ógvuliga nær lágu húsunum í Torkilsgøtu. Íbúgvarnir í Torkilsgøtu eru sera ónøgdir við ætlaninar, og kanska serliga við framferðarháttin hjá býráðnum, sum tykist vera púra burturvið.

### Stór ónøgd

Marian á Borg og Dan Kjelnæs eru tvey av mongu ónøgdu húsaeigarunum í Hoyvíkshaganum.

– Eg haldi tað vera løgið, at loyvið verður givið at byggja eigaraíbúðir í tveimum hæddum so kloss upp at okkara eittplanshúsum. Tey koma at síggja beint niður í okkara stovu, og vit koma ikki at síggja nakað sum helst. Høvdu hesi nýggju húsini av illum verið eittplanshús eisini, men tey verða í tveimum fullum hæddum. Tað fer at myrkja ótrúliga nógv um inni hjá okkum, sigur Marian á Borg, sum í næstum fer at fáa nýggjar grannar tætt uttanfyri stovuvindeygað. Hon undrast á, at teirra hús ikki fingu loyvi at hava eina reising á 45 stig, tá ið loyvi verður givið at byggja so høgt beint frammanfyri.

Dan Kjelnæs, ið eisini er húsaeigari í Torkilsgøtu heldur við Marian.

Tað tykist ótrúliga óloggiskt at byggja øll húsini her uppi í einum ávísum lágum stíli, og so byggja tey niðastu húsini í tveimum fullum hæddum. Vit koma at fáa ein veldigan kassa beint frammanfyri vindeyguni, men vit sluppu ikki at hava eina hægri reising. Hetta tykist sum tað reina idioti, sigur hann.

### Eingin kunning

Men tað, sum nervar Marian og Dan mest av øllum, er, at tey einki hava hoyrt um byggiætlaninar frá býráðnum.

– Vit vórðu ikki kunnað á nakran hátt. Eg haldi, at tað skuldi verið tað minsta, at vit fingu kunning um hetta. Vit vistu ikki av, fyrr enn hesir stóru múrarnir vórðu reistir beint frammanfyri stovuvindeyguni. Longur niðri eru eisini raðhús av hesum slagnum bygd, og tey tóku eisini nógv av okkara útsýni. Men tað ger minni, tí tey eru so langt burtur. Men so hava teir bygt tættari og tættari, og nú hava vit teir beint uttanfyri. Tað minsta býráðið kundi gjørt, var at kunna okkum um hetta, heldur Marian. Hon greiðir frá, at tá ein í Torkilsgøtu ætlaði at byggja sær ein kvist á húsini, varð tað málið lagt út til grannahoyringar. Øll í Torkilsgøtu skuldu skriva undir uppá, at tey góðtóku hesa byggingina, hóast hon als ikki kom at verða nakar bági. Tí tykist tað serliga løgið, at Guttesen og Stakksberg, sum eru farnir undir at byggja høgu blokkarnar í Maritugøtu, skulu hava fingið loyvi, uttan so mikið sum at kunna nábúgvarnar í Torkilsgøtu um tað.

– Hetta er ræðuliga keðiligt, og vit eru øll líka ónøgd við einki at hava frætt. Hetta vísir bara hvussu lítið man hevur at siga, tá man keypir eitt raðhús, sigur Marian. Eg havi tosað við eigarafelagið her uppi, og eg havi skilt á lagnum, at ein klaga verður borin oman á býráðið í næstum. Tað er fyri neyðini, tí eg haldi ikki, at teir skulu sleppa óátalaðir í hesum málinum. Hetta tykist sera dupultmoralst, at so stórur munur skal verða gjørdur á byggiloyvunum á so tøttum grundøkjum uppá so stutta tíð. Hetta kann als ikki góðtakast, heldur Marian. – Eg vóni, at teir eisini innsíggja tað niðri á býráðnum. Mín dreymur er, at byggiloyvið verður broytt, so húsini frammanfyri verða eittplanshús ístaðin, sigur hon.

Dan og Marian eru bæði ivasom, tá tey verða spurd hvørt tey høvd keypt húsini, um tey vistu, at tað fór at verða bygt í tveimum hæddum so tætt uppat teirra stykki.

– Tað er ringt at svara uppá, men so høvdu vit kanska umhugsað tað eitt sindur longri. Tað, sum tó fellur okkum tyngst, er, at tað verður so stórur munur gjørdur á byggiloyvunum hjá grannum. Og at so lítið verður gjørt við at kunna fólk um, hvat fyriferst á økinum rundanum húsini.

## Eingin viðmerking frá býráðnum

Sosialurin hevur roynt at fingið viðmerking frá býráðnum, men hetta hevur ikki borið til. Michael Viderø, býararkitektur, hevur ikki verið tøkur vegna fundarvirksemi og Heðin Mortensen, formaður í býar- og bygginevndini hevur ikki verið at hitt.

Sum skilst, fer Eigarafelagið í Torkilsgøtu at bera eina klagu um byggingina í Maritugøtu oman í býráði í dag.

**eys**

Guttesen og Stakksberg:

# Hetta er ein gomul ætlan

**– Høvdu eigararnir í Torkilsgøtu farið oman á býráði, so høvdu teir sæð tekningarnar av byggiætlanunum. Vit hava havt hetta stykki síðani 1989, og ætlanin hevur so at siga verið tann sama allatíðina. Tað sigur Eyðfinn Guttesen frá Guttesen og Stakksberg, ið eigur økið í Maritugøtu. Teir gera jørð og betong arbeiði, og eru nú farnir undir at byggja raðhús í tveimum hæddum, beint frammanfyri húsini í Torkilgøtu**



*Beint niðanfyri eittplans raðhúsini á Torkilsgøtu 12-24 verða nú nýggj raðhús bygd í tveimum fullum hæddum. Húsaeigararnir í Torkilsgøtu eru sera ónøgdir við hetta og við handfaringina av av málinum*

*Kelda: www.kortal.fo*

HÚSABYGGING
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin*

– Vit hava gjørt onkra smábroyting í mun til upprunaligu ætlanina, m.a. var ætlanin at hava eitt parkeringspláss, men tann ætlanin er nú slept. Annars er ætlanin júst tann sama, sum bleiv samtykt í 1989. Vit áttu hetta styki langt áðrenn Høgni Mikkelsen, sum bygdi húsini í Torkilsgøtu, keypti økið har uppi. At eigararnir ikki eru kunnað um ætlaninar er kanska harmiligt, men tey kundu altíð farið oman á býráði at spurt sjálvi. Ætlaninar hava ligið har niðri líka síðan 89, sigur Eyðfinn Guttesen. Hann heldur víðari, at um tú ynskir at búgva í býnum, so kanst tú ikki vænta tær nakað útsýni.

– Tey vistu øll, at her lá eitt stórt stykki niðanfyri, sum okkurt allarhelst fór at verða bygt á, fyrr ella seinni, sigur hann.

Hann greiðir frá, at Guttesen og Stakksund hava hildið seg innan fyri byggisamtyktina, og hava einki ólógligt gjørt.

– Vit søktu um byggiloyvi og fingu játtandi svar. Tí kann býráðið ikki bara soleiðis uttan víðari broyta samtyktina, greiður Eyðfinn frá.

Tey í Torkilsgøtu skulu tí ikki vænta sær nakað av mótmælisskrivinum. Býráðið hevur heilt einfalt ikki heimild til, at taka loyvið aftur nú, sigur Eyðfinn Guttesen. Hann vil tó ikki gera viðmerkingar til, hvørt tað er dupult av býráðnum at nokta teimum reising uppá 45 stig, tá Guttesen og Stakksund kunnu byggja við tveimum hæddum.

– Hatta veit eg einki um. Eg veit bara, at eg havi fingið loyvi til tað arbeiðið, sum vit gera nú, og tað hava vit havt síðani 1989. Hvørjar aðrar síður eru í málinum, sum tey í Torkilsgøtu eru ónøgd um, veit eg ikki, sigur hann at enda.



# Svong ferðafólk í Klaksvík

**Kokkurin á Pizzaria Napoli í Klaksvík, Niels Aage Bjerre, ella betur kendur sum Pizza Aage noktar at gera mat til týsk og fronsk ferðafólk. Hetta kemst av støðuni hjá stjórnunum í báðum londunum til kríggið í Irak**

BOYKOTTING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Danin Pizza Aage noktar at matgera fyri týskum og fronskum ferðafólkum, tí at stjórnirnar í hesum báðum londunum ikki taka undir við Irak krígnum*

*Mynd: SáH*

**Klaksvík:**
Um týsk ella fronsk ferðafólk leggja sær leiðina inn á Pizzaria Napoli, skulu tey ikki vænta at fáa nakað at eta, um tað er Pizza Aage, sum skal gera matin. Hann tekur undir við støðuni hjá USA viðvíkjandi Irak krígnum, og av tí, at franska og týska stjórnin ikki gera tað, so vil hann heldur ikki matgera fyri teirra veljarum.

– Týskland hevur veittrað farvæl til ein gyltan møguleika fyri at sleppa sær úr skugganum frá nazitíðini við at taka undir við USA í Irak støðuni. Og tí nokti eg at gera mat til týskarar og fransmenn, sum jú eru teir, ið hava valt stjórnarlimirnar, sigur Pizza Aage púra avgjørdur á málinum.

Hann heldur ikki, at tað er nakað sum helst løgið við støðu hansara til hetta málið, og lýsir tað sum eitt prinsipp, sum hann heldur fast við. Og samstundis leggur hann dent á, at hann greiðir bara ferðafólkunum frá sínari støðu. Hesi skilja hann væl, og tað hevur ikki verið nakar stórvegis trupulleiki av tí, sambært Pizza Aage.

Men spurdur, um hann veruliga sendir fólk útaftur úr Pizzarianum svong, svarar Pizza Aage bara, at tað finnast onnur støð í Klaksvík, har tey kunnu eta.

### Virðing í revsingini

Í fjør átti sami Pizza Aage eitt pizzaria á Fanø í Danmark. Har var sama prinsipp galdandi, og hann noktaði at gera mat til týsk og fronsk ferðafólk. Hetta endaði við, at hann var meldaður og ákærdur sambært rasudiskriminatiónslógini í Danmark. Dómur varð feldur yvir hann, og hann skal sita átta dagar í fongsul fyri hetta lógarbrot.

– Eg havi fingið at vita, at eg skal inn at sita einaferð í 2005, so tað bíði eg bara eftir. Eg umhugsaði at kæra dómin inn fyri Hægstarætti, men eg helt, at tað var størri virðing í at fara inn at sita heldur, so tað fari eg, sigur hann. Og tað er ikki eitt gran av skemti í hansara rødd, so ongin ivi er um, at maðurin meinar tað, sum hann sigur. Men hinvegin heldur fryntiligi pizzamaðurin tað vera kostligt, at hann varð dømdur eftir rasudiskriminatiónslógini, tí sjálvur heldur hann, at rasur koma bert undir húðalit og religión. Tað hevur onki at gera við politiskar ósemjur. So tí flennir hann bara at.

Og nú arbeiðir hann so í Klaksvík, har enn framvegis stendur við sítt prinsipp um, at týskarar og fransmenn ikki fáa mat frá honum.

Ikki føroyingar

Tá Aage verður gjørdur varugur við, at Føroya Løgting samtykti í mars mánaði í fjør eitt mótmæli í móti Irak krígnum, sigur hann, at Føroyar eru eitt av teimum smáu londunum.

– Mín boykotting fevnir bert um Týskland og Frankaríki, tí at tey eru tvey stór limalond í ST, og tey hava stóra ávirkan á onnur lond sum til dømis Belgia og Russland. Tey hava eisini sagt nei, men tey boykotti eg ikki fyri tað. Og sum sagt er tað serliga Týskland, sum eg haldi hevur gjørt ein brølara her, tí tey tóku ikki av einum gyltum møguleika til at bøta um teirra keðiliga umdømi í fortíðini. Men føroyingar skulu verða hjartaliga vælkomnir higar, og eg havi ongar trupulleikar við at gera mat til teirra, slær Pizza Aage fast.

### Ikki góðtikið

Eigarin av Pizzaria Napoli hevur sambært heimasíðuni hjá Norðlýsinum onga viðmerking til hetta. Men tað hevur leiðarin á norðoya kunningarstovu, Christian Olsen har afturímóti. Hann sigur, at tað at ein danskur kokkur við rasistiskum tendensum vísir ferðafólki í norðoyggjum durðafjórðingin er sera óheppið fyri allar norðoyggjar.

– Tá vit sum kunningarstova hava faldara frá matstøðum í býnum og geva teir víðari til ferðafólk, vænta vit, at tey sum geva okkum faldararnar, eisini geva ferðafólkunum góða viðferð. At kokkurin hjá Pizzaria Napoli hevur rasistiskar tendensir rakar ikki hann, men allar norðoyggjar. Tað verða vit sum standa eftir við Svartaperi, og tað kann eg als ikki góðtaka. Hetta havi eg eisini gjørt greitt fyri eigaranum av Napoli, og um hann ikki fær skil á sína fyritøku, verður faldarin hjá teimum ikki longur á skránni hjá okkum, sigur Christian Olsen við heimasíðuna hjá Norðlýsinum.

Neyðtøka í Runavík:

# Kanningarnar halda fram

**Nøkur fólk hava vent sær til løgregluna í Runavík í sambandi við neyðtøkuna av eini 18 ára gamlari gentu sunnunáttina. Eisini eigarin av einum silvurgráum bili hevur vent sær til løgregluna**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*




*Løgreglan kannar framvegis málið um neyðtøkuna av einari 18 ára gamlari gentu á eystanstevnu seinasta vikuskiftið. Tilburðurin fór fram við Statoilstøðina í Runavík*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Enn eru ikki so nógvir upplýsingar at heinta frá løgregluni um hetta málið. Og tað letur til, at tað eru fleiri orsøkir til tess.

Fyri tað fyrsta eru tað ikki so øgiliga mong, sum hava vent sær til løgregluna hesum viðvíkjandi. Og fyri tað næsta vil løgreglan vísa serlig fyrilit fyri gentuni, sum má sigast at vera stak illa fyri eftir hesa skelkandi hendingina á eystanstevnu. Men Per Skov Christensen sigur tó, at tað eru nøkur, sum hava boðað løgregluni frá, at tey kenna persónar, sum svara til lýsingina av gerningsmanninum. Hesar fráboðaninar skulu nú kannast, og løgreglan fer at seta seg í samband við persónarnar fyri at tosa við teir.

– Vit hava fingið fráboðanir frá fólki, sum siga seg kenna persónar, sum líkjast ella minna um lýsingina, men tað er jú alt so óvist, so tað skal kannast, sigur Per Skov Christensen.

Eisini eigarin av einum silvurgráum persónlbili er komin fram, men enn er ikki staðfest hvørjir persónar vóru við í bilinum.

Løgreglan er eisini farin at umhugsa tann møguleikan, at persónbilurin mest sum av tilvild hevur minkað um ferðina júst har og í veruleikanum hava persónarnir kanska ikki hugsað um, hvat fyrifórst við Statoilstøðina. Men enn eru hetta bert gitingar, og sum tað letur til, so hevur løgreglan enn ikki nøkur ítøkilig spor at ganga eftir.

### Kanningar

Løgreglan arbeiðir framvegis við at kanna málið.

Nógvar kanningar hava verið gjørdar á staðnum, og klæðini, sum gentan var í skulu eisini kannast.

– Eg fái ikki sagt so nógv sum nú er. Bæði tí at helst skulu vit ikki avdúka alt í fjølmiðlunum og eisini tí, at gentan er stak illa fyri, og tí kann hetta ávirka hana sera nógv, sigur Per Skov Christensen, sum tó væntar, at málið verður yvirtikið av kriminaldeildini.

Hetta váttar leiðarin á kriminaldeildini, Bergleif Brimvík. Hann sigur, at deildin er komin inn í myndina, og fer hon at avhoyra gentuna aftur.

Eisini skulu aðrar kanningar gerast, sigur hann. Bergleif eins og Per er sera varin við at siga nakað, tí fyrilit skulu vísast fyri ofrinum.

### Almenningurin til hjálpar

Tað kann ikki sigast at vera ofta, at slíkar eftirlýsingar verða sendar út frá føroysku løgregluni.

Bergleif Brimvík sigur, at so er, men tað verður umhugsað í hvørjari einstakari sak, um eftirlýsingar skulu sendast út ella ikki.

– Í hesum førinum var tað mett at vera av stórum týdningi fyri uppkláringina av sakini, at fáa hjálp frá møguligum vitnum. Tá ikki so nógvir ítøkiligir upplýsingar eru um gerningsmannin, og ein bilur er sæddur koyra framvið, so er tað upplagt at royna at fáa upplýsingar tann vegin, sigur leiðarin á kriminaldeildini.

Løgreglan fer sum sagt at avhoyra gentuna umaftur og onnur, sum møguliga vita eitthvørt um hendan tilburðin.

– Tað skulu nágreiniligar avhoyringar til, men tá tað er sagt, so er tað sanniliga eisini okkara skylda at verja ofrið, sigur Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá løgregluni.